# HEILSANIR



**Góða Martha!**
Hjartaliga tillukku á 17 ára degnum og nógv góð ynskir í framtíðini. Deiligt at hava tykkum í Føroyum aftur.
**Bestu ynskir frá mammu & Co.**



**Hr. Witt í Miðvági!**
Hjartaliga tillukku við degnum. Hetta má vera, ein av teimum fáu løtunum, sum tú slappar av.
**Vít í undirhúsinum**



**Góði Filip!**
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum 10. august. Muss og klemm frá
**ommu og abba á Stoffalág**



**Tvíburarnir Karl Frits og Kristoffur!**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tykkara
**Ynskja omma og abbi**



**Tvíburarnir Karl Frits og Kristoffur!**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum tann 8. august.
**Ynskja mamma, babba og didda**



**Góði Filip!**
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum 10. august.
**Ynskja systkinabørnini í Lágni**



**Góða Sirið!**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum. Øll góð ynskir í framtíðini. Vit elska teg.
**Heilsan frá okkum øllum Rebekka og Teresa**



Øllum tykkum, sum við gávum, kortum og fjarritum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 13. apríl, takki eg hjartaliga.
**Marin í Dali, Trongisvágur**



**Góði Bjartur!**
Hjartaliga tillukku á 9 ára degnum.
**Ynskja omma og abbi**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 16. november, og gjørdu okkum dagin ógloymandi.



Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum við gávum, telegrammum, blómum og á annan hátt, gleddu okkum og gjørdu hjúnabands- og dópsdag okkara 8. mars ógloymandi.
**Leila og Marnar, Irena og Jónleyg**





Omman hjá ogon, Aslaug av Rana, fyllir 75 ár í dag. Tillukku omman, nú leingjast ogur illa eftir tær.
**Tabita og Boas**



**Góði Bjartur!**
Hjartaliga tillukku á føðingardegnum.
**Heilsan hann, ið stendur aftanfyri**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .........................................................................
Bústaður: ...................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

**Sosialurin**

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

## BRÚDLEYP

Í dag, 9. august kl. 15.00 giftast í Býráðshøllini í Klaksvík, Lina Petersen, Norðdepli og Mikkjal Petur Næs, Hvalba. Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19.00 á Hotel Norð, Viðareiði.

Í dag, 9. august kl. 16.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Oddvør Naina Magnussen og Dánial Jespersen. Veitslan verður fyri innbodnum á Svangaskarði.

Í dag, 9. august kl. 16.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Herdis Beder Thomsen, Fuglafjørður og Jón Simonsen, Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum í Fuglafjarðar Mentanarhúsi kl. 19.00.

Í dag, 9. august kl. 14.00 giftast í Asnæs Kirke Gyða í Gongini og Morten Hansen.
Brúdleypsadr.: Høve Skovpavillon, Pavillionvej 15, Høve Strand, 4550 Asnæs.

Í dag, 9. august kl. 13.30 giftast í Kúrdali, Sunva Eysturoy og Poul Jens Lassen. Um ikki viðrar, verður vígslan í Ebenezer.

Í dag, 9. august kl. 11.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Gudrun Óladóttir Poulsen og Steinbjørn Zachariassen.

Í dag, 9. august kl. 14.00 giftast í Berøa Irdi Hansen, Saltangará og Ken Nónklett, Glyvrar.

16. august giftast í Nordstrand kirke, Oslo, Lina Lysaker og Kent Heinesen, sonur Hallgerð Heinesen og Poul D. Jensen. Adr.: Jacobaallsgade 45 B, Oslo.

Leygardagin 16. august giftast í Sandby kirke Katrin Bloch Heinesen, dóttur Elsu Bloch Heinesen og Jóannes Heinesen í Sandavági, og Boris Gerencer úr Fraklandi. Brúleypsadr.: Søparkallé 10, 4171 Glumsø.

## SILVURBRÚDLEYP

Anni og Godtfred Joensen, Klimvej 24, Ålborg Ø, hava opið hús 11. august. Vælkomin.

Mánadagin 11. august hava Anna og Heri Larsen, Porkeri, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

## GULLBRÚDLEYP

Mánadagin 11. august hava Hjørdis og Edvard Vilhelmsen, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Opið hús verður Millum Gilja 1, Hoyvík, frá kl. 19.00.

18. august hava hjúnini Esther og Sámal Mikkelsen, Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin sunnudagin 17. august frá kl. 15.00 í heiminum undir Hálsi 25. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 85 ÁR

Mánadagin 11. august verður Andrea á Regni, Toftir, 85 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 10. august á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík frá kl. 17.00.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 09.08. Runavík (til kl. 12) tlf. 44 80 16
– – Eiði (frá kl. 12) tlf. 42 30 06
Sunnudagin 10.08. Eiði, tlf. 42 40 06

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

**Gudstænastur**
**8. sunnud. e. trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Erland Beder
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Hestur:* kl. 14, Bergur D. Joensen og Snorri Brend
*Vestmanna:* kl. 11, Mogens T. Christensen
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Funningur:* kl. 12 messa, Emil Olsen
*Mykines:* kl. 11, altarg., David Johannesen
*Skála:* kl. 11 altarg., Jógvan Fríðriksson
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Elduvík:* kl. 12, Uni Næs
*Vágur:* kl. 11,
*Porkeri:* kl. 12.15, altarg., Jónsvein Bech

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti og tilbiðjunarmøti kl. 12. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin. Heimasíðan: www.livdin.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 18 Møti, Erna og Arne Kaltevik tala og syngja. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Patrick Sheils í Mariukirkjuni.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, Símun í Túni talar um evnið: Syndabukkurin. Barnaansing er samstundis. www.hebron.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin Møti v/ Henry D. Joensen, Argir.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn, kl. 20 Møtirøðin »Ein nýggj byrjan« við Ólavur Jacobsen og Sonna Djurhuus.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jakobsen, kl. 18 Møtirøðin »Ein nýggj byrjan« við Ólavi Jacobsen og Sonna Djurhuus heldur fram.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Derhard Olsen.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli og kl. 17 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Paula Høj. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti og útimøti um viðrar.

**Haldórsvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti í Avhaldshúsinum við Sigfred Johannessen og Harry Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Møti við André Matras (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 Bønar- og lovsongsløta, kl. 18 Møti v/ Friðleif Lydersen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Karl og Elidu Kenning. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Elisabet og Sámal J. Joensen.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og møti kl. 18. Øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 21 Bønarmøti, frá kl. 21-23 verður Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.**
**12. august kl. 15.00 sigur Margit Øster frá um barndómsdagarnar í 1930'unum í Tróndargøtu í Havn.**
***Fotoframsýning* í kjallaranum í Tilhaldinum av útoyggjamyndum hjá Hjalmari Waag Høgnesen verður til og við 8. august 2003.**
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 10. aug. verður gingið til Skorastovu og Gamla Dalhús í Dølum. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Miðaltungur túrur og gingið verður uml. 6 tímar. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Javni**
Skrivstovan er *stongd vegna summarfrí.* Opið er aftur 11. august 2003.
Hevur tú atrokandi boð ella spurning, so ring til lim í starvsnevndini ella økisnevndini.
Heimasíðan: www. javni.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317,

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.